miðvikan

Nr. 123 • 01. juli 2009

**Siðsøguligt tilfar**
í Sosialinum mikudagar

**Eitt 200 ára minni um eitt skalvalop:**

# Fýra løgmenn ættaðir av Blankaskála

**Ein tann kendasta avtoftaða bygdin í Føroyum man vera Blankaskáli. Úr hesi bygd er eisini ein hópur av fólkið ættað. Orsøkin til avtoftingina var eitt skalvalop á vári 1809 fyri júst 200 árum síðani. Vit lýsa søguna og nøkur av fólkinum, sum eru ættað haðani**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Hóast bygdin var lítil umboðar hon eitt sindur av Føroyasøgu, tí hon er upprunin hjá minst einum løgmanni í gamlari tíð og fýra løgmonnum í nýggjari tíð. Teir eru Hákun Djurhuus, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein og Anfinn Kallsberg.

Blankaskáli liggur vestantil á Kallsoynni, beint yvirav Leirvík, bygd á sólsíðuni, vard móti kuldaættum av høgum fjøllum, tiltikið kornpláss. Bygdin var helst tann fyrsta á Kallsoynni.

Á Blankaskála vóru heilt aftur til 1584 fýra hús, og í 1801 búðu har 29 fólk. Húsini kallaðust Suður í Stovu (Kongsstovan), Miðstovan, Uttari í Húsi og Lykkershús.

Keldurnar til hesa grein eru fyrst og fremst J. Símun Hansen og Freydis Poulsen.

## Skalvalopið

Um várið 1809 legðist stórkavi og skalvar hópaðu seg upp í líðini omanfyri bygdina. Tá kemur toybil. Blot kom í kavan, og skalvurin leyp. Tað sigst, at hetta var 9. apríl.

Hetta sá øgiligt út, og bert Guds hond kundi steðga eini vanlukku, og tað gjørdi hon eisini. Á einum lítlum fláa beint omanfyri húsini steðgaði lopið á, fór í tvíningar og kom oman báðu megin húsini. Tað fóru nøkur úthús og ein hundur, men bygdin var bjargað.

Sagt verður um ein lítlan drong, at hann skuldu fara at leggja seg og stóð og læt seg úr, tá ið øgiligt buldur var. Lamsligin av ræðslu stóð hann og helt tvørtur um bíleggarovnin.

Tá vóru bert 44 ár liðin síðan skalvalopið í Gerðum, sum kostaði tjúgu mannalív. Fólkið í bygdini fekk tískil skrekk fyri at búgva á Blankaskála.

Fólkið rýmdi beinanvegin til Lorvíkar, og teir róðu hvønn dag um fjørðin at ambæta neytunum. Seinni hetta summar fóru tey tó aftur til Blankaskála at vera.

Bygdafólkið visti, at har ein skriða er lopin er onnur væntandi, so tey tordu ikki at blíva verandi.

Tey avgjørdu at flyta av bygdini, og harvið varð Syðradalur á Kallsoynni bygd. Í 1816 var eingin sum búði á Blankaskála. Húsanøvnini fylgdi við ættunum í Syðradali.

Tey varðveittu eini hús, tí í eini 100 ár var framvegis tørvur á at fara yvir á Blankaskála at hoyggja. Og heilt fram til 1960-ini hava menn av Syðradali havt veltur á Blankaskála, tí her vaks munandi betri enn á Syðradali.

## Søgan um Miðstovuna

Eitt av húsunum í bygdini var sum sagt Miðstovan. Pól Joensen í Kongsstovuni, sum sat við festinum frá 1686 til 1723, átti ein son, sum æt Símun, f. 1695, sum giftist inn í Miðstovuna. og er hann fyrsti maður vit kenna í Miðstovuni.

Tann fyrsti Símun giftist um 1720 við Barbaru Eriksdatter úr Mikladali, men hann doyr í góðum árum í 1735. Eftir situr einkja við fimm ótilkomnum børnum.

Miðstovan var valahús. Tey áttu hálvaaðru mørk, glasstovu, sum stóð leys frá sjálvum húsinum, bát, neyst og tey høvdu fimm neyt.

Við eini ognarmeting í 1751 er Miðstovan tað hús í bygdini, sum er best fyri. Og hetta sæst eisini á toftunum heili 200 ár eftir, at bygdin er niðurløgd. Miðstovan var nógv størsta húsið.

Ein sonur kallaðist Hans, ella Hanus, er føddur umleið 1732. Hann fór ungur vestur í Vágar til systkinabarn sítt, løgmannin H.J. Debes, sum eisini var ættaður av Blankaskála, at vera, og Hanus giftist í Sandavági. Tey áttu fleiri børn, og Hans/Hanus navnið livir enn í ættini.

Ein dóttir Símun, Cathrine Simonsdatter, f. 1723, giftist við Ole Jacobsen, f. 1716, bónda í Tjørnustovu í Norðragøtu, og hervið byrjar "innrásin" av Blankaskála til Gøtu.

Hesin Ole átti eina dóttir, Cathrine f. 1760, sum fór vestur í Vágar. Frá henni er William Heinesen ættaður.

Ein oldurabbasonur Ole Jacobsen var Ole Gregersen í Syðrugøtu, og gjørdist hann forfaðir til alla ta stóru Gregersen ættina, sum kemur úr Gøtu.

Tann fyrsti Simon Poulsen átti ein abbason, sum eisini kallaðist Simon Poulsen, f. 1759. Hann doyr á útróðri í 1803, sum greitt er frá í frásøgnini hjá J. Símun Hansen.




*"Býarkort" av Blankaskála*

Símun og konan, Susanna, áttu seks børn, og av teimum endaðu trýggjar døtur í Gøtu, meðan ein fjórða giftist gøtumanni, sum búði í Lorvík.

Hesar døtur vóru:

**1. Ellen Simonsdatter f. 1791**, giftist við Jacob Joensen í Syðrugøtu, tey búðu við Grógv. Annar av teirra synum var Skúla-Jógvan, ið hevur verið ein tann fyrsti lærarin í landinum. Bartalstovufólkini eru ættað frá henni.

**2. Lisbeth Simonsdatter, d. 1794**. Hon giftist fyrst til Leirvíkar og síðan við Óla Jákup Heinesen, úr Norðragøtu. Tey búsettust í Leirvík, og fingu eitt barn, Ellen Marie Ole Jacobsdatter, sum er ættarmóður hjá millum øðrum Finnboga Ísaksson.

**3. Barbara Simonsdatter f. 1799**. Hon giftist inn í Barbustovu í Syðrugøtu, sum henda Barbara tó ikki hevur lagt navn til. Tað sigst at Barbara kom til Gøtu sum smágenta, eftir at pápin sum nevnt var deyður á útróðri í 1803. Maður hennara varð Petur Poulsen.

Elsta dóttirin, Elsebeth, giftist við Johannesi Michelsen, eisini kallaður Havna Jóannes. Nógv av teimum, sum eita Mikkelsen, eru ættað frá teimum.

Sonurin, Poul, átti dóttrina Berlinu, sum giftist við Per bónda í Húsgarði, og sum tískil m.a. er ættarmóður til tey, sum eita Húsgarð/Husgaard.

So vórðu tvær døtur Barbaru, Súsanna Fredrikka og Elsebth Malena, giftar til Gjáar, har pápabeiggi teirra eisini var giftur. So nógv av fólkinum norðantil í Eysturoynni er ættað frá teimum. Millum hesi Jógvan Sofus Ferjá.

**4. Súsanna, f. 1799**, og tískil tvíburðasystir Barbaru, giftist við Peder Thomsen í Jørisstovu í Norðragøtu. Millum teirra eftirkomarar eru Essa Arge og Oddfríður Gregersen.

Ein beiggi Poul var verandi á Blankaskála, og tann yngsta systirin Sigga f. 1803, giftist til Fuglafjarðar við Thomas Jacobsen.



*Hesir løgmenn hava røtur til Blankaskála*